Sosialurin



# Man má tora at fáa



*- Eg skilji ikki rættiliga, hví tað skal vera tabu at hava epilepsi, sigur Ása*

*mynd: Jens Kr. Vang*

**Umleið 400 føroyingar hava epilepsi, men fáir teirra tora at viðganga tað alment. Ein teirra, sum kortini gongur ímóti hesum streyminum er 19 ára gamla Ása Súnadóttir av Skála. – Eg veit ikki, hví epilepsi er eitt tabu-evni. Eg haldi, at tað er óneyðugt, sigur hon.**

UNGDÓMSLÍV

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skála:** - Tað strævnasta við at hava epilepsi er, at eg ongantíð veit nær eitt anfall kemur – annaðhvørt tað er á degi ella á nátt!

Ása fekk staðfest epilepsi fyri hálvum triðja ári síðani, meðan hon gekk á donskum eftirskúla. Hetta kom sjálvandi sera óvart á hana og familju hennara.

Epilepsi er ein kronisk sjúka, men 3 út av 4 sleppa undan anføllunum við heilivági, sum kunnu koma sum ljós frá klárum himni.

Hetta veit Ása alt um, tí tað fyrsta árið við sjúkuni hevði hon sera ofta anføll, - eitt skifti hevði hon minst eitt epileptiskt anfall um dagin!

Nú fær hon ikki anføll so ofta, men hon hevur lært seg at liva við at hava epilepsi.

> *Tað nyttar einki bara at seta seg inni og kúra. Eg eri komin víðari, og tað eri eg glað fyri*
>
> *(Ása Súnadóttir)*

- Man má bara koma víðari. Tað nyttar einki at seta seg inni og kúra. Eg havi valt at gera tað sama sum eg gjørdi áðrenn eg fekk epilepsi, og tað hevur eisini havt við sær at eg millum annað havi fingið anfall hjá tannlæknanum, í biografinum, í SMS og aðrastaðni.

- Men um eg bara seti meg inni og bíði eftir at eitt anfall fer at koma, so er eingin lívskvalitetur eftir. Man má tora at fáa anfall har onnur síggja tað. Tað havi eg valt at gera, og tað eri eg glað fyri, slær hon fast.

Í hesi samrøðuni greiðir 19 ára gamla Ása frá einum lívi við epilepsi. Einum lívi, sum ikki er so nógv øðrvísi enn hjá øðrum.

- Eg skal faktiskt giftast um eitt ár!, avdúkar Ása fyri Sosialinum.

Mikukvøldið fer hon at greiða frá hvussu tað er at liva við epilepsi, tá Epileptikarafelagið skipar fyri einum ungdómstiltakið í skúlanum á Skála.

## Tosa spakuliga

Hagtølini vísa, at umleið 1 % av fólkinum hava epilepsi. Í Føroyum skuldi talið tí ligið um tey 400 – men hvussu er tað: Hoyrir ein nakað um hesa líðingina í dagligari talu?

Hóast eitt felag er fyri fólk við epilepsi og teirra avvarðandi er í Føroyum, so er hetta kortini ikki ein líðing sum tosað verður hart um.

Ása er kortini eitt undantak. Hon vil fegin siga frá síni søgu fyri lesarunum hjá Sosialinum.

Hetta ger hon ikki, tí hon sjálv vil fram uppá nakran máta. Hennara ynski er einans at varpa ljós á eitt fyribrigdi, sum mong ikki vita hvat er, og har tey, sum hava epilepsi, velja at tiga við tí, helst tí at tað er flóvisligt.

- Eg skilji ikki rættiliga, hví tað skal vera tabu at hava epilepsi. Eg havi valt at verið opin um tað, og eg haldi at fólk rundan um meg, og eg sjálv, eru fegin um tað.

- Eg haldi í øllum førum ikki, at tað er so trupult at tosa um, sigur Ása sum tvær ferðir um dagin má taka neyðugan heilivág.

## Sleppa undan ótta

Ása fekk epilepsi tá hon gekk á eftirskúla í Danmark. Øll á skúlanum vistu, at hon fekk anføll, og fyri Ásu kendist tað gott at fáa góðan stuðul frá skúlafeløgum hennara.

- Tá eg kom heimaftur, var tað eitt sindur truplari at fortelja. Tú veist, tað er ikki altíð so lætt at byrja eina samrøðu um eitt slíkt evni. Hvussu í allari víðu verð skal man siga tað? Skal eg kanska klirra á glasið, reisa meg upp og siga: "Hey tit, eg havi epilepsi!" spyr hon.

- Eg vil faktiskt ikki siga, at tað er so torført at tosa um tað at hava epilepsi, men viðhvørt er tað ringt at koma inn á evnið. Fólk eru ofta forvitin, og hava nógvar fornuftigar spurningar, sum eg fegin svari uppá.

- Eg haldi at tað er viktugt at vera opin um sjúkuna, so fólk ikki eru bangin fyri, at eg fari at fáa anfall. Eg vil eisini gjarna vita, hvat onnur hugsa um at eg havi epilepsi. Eg royni altíð at siga fólki, hvat tey skulu gera, um tey koma fram á eitt anfall, men eg dramatiseri ikki, sigur Ása.

Hon ivast onga løtu í, at tað eru fleiri ung, sum hava epilepsi, men sum ikki tora at siga frá tí. Hon kennir ei-